# Betri samfelags-tilvit

2022





# Týdningurin av hvørjum øðrum

*"Vit eru komin hertil, tí vit hava hildið saman."*

EVY JACOBSEN
FORSTJÓRI Í BETRI HOLDING

Í summum bygdum sært tú bygningar við einum skelti uttaná, har tað stendur Betri. Í hesum bygningum finnur tú tvey sløg av fólkum. Viðskiftafólkini – tey, sum leita sær inn, tí tey mangla fígging, stuðul ella lán til at realisera eina verkætlan, eitt hugskot, ein dreym; tey, sum vilja spara upp til okkurt ávíst endamál ella til pensjónsárini; tey, sum vilja tryggja seg, síni og sítt. Og so starvsfólkini – okkum, sum arbeiða í Betri. Okkum, sum umsita pengarnar hjá øðrum og tryggja, at pengarnir enn eru her í morgin, ovurmorgin, og tá ið tey fara á pensjón, og okkum, sum veita stuðul til samfelagsgagnlig endamál.

Til tíðir kunnu mótsetningar uppstanda millum hugsjónarrík viðskiftafólk og meira grundføst starvsfólk. Hugskot og verkætlanir hjá viðskiftafólkum kunnu fyri starvsfólkunum tykjast háfloygd – og starvsfólkini av viðskiftafólkunum tykjast neilig og snævurskygd. Men í grundini hava vit tørv á báðum. Føroyar, ja, allur heimurin hevur tørv á báðum, tí hesi hanga saman eins og dagurin og náttin verða knýtt saman av morgni og kvøldi. Tey, sum koma til okkara, hava tørv á okkara tænastum, men eisini okkara vitan og góðu ráðum. Og vit hava tørv á hugsjónarríkum viðskiftafólkum, tí hesi eru framsøkin og skapa framgongd, so at lívið og gerandisdagurin í Føroyum gerst eitt sindur stuttligari.

Hví hesa lummafilosofisku innleiðing til eina CSR-frágreiðing? Jú, tí onkuntíð er neyðugt at minna seg á, hví mann er til. Ikki hvør mann er, og hvat mann ger – men hví.

So tá ið vit siga, at Betri er eitt felag, vit eiga í felag, so er tað ikki bara nakað, sum ljóðar væl og sær gott út á skrift. Tað er eisini orsøkin til og fortreytin fyri allari framgongd, sum felagið hevur – og nakrantíð hevur havt. Vit eru komin hertil, tí vit hava hildið saman. Tað, sum er við lítlum oyggjasamfeløgum, er, at tað er so ómetaliga skjótt at blíva burtur í onkrum størri samfelagi. Hvussu nógv oyggjasamfeløg eru at finna í øllum Atlantshavinum; sum bæði hava sjálvstýri, methøga bruttotjóðarúrtøku og nærum null arbeiðsloysi? Oyggjasamfeløg, sum eru vorðin til vælferðarsamfeløg av sínum eintingum?

Eitt.

Og Føroyar hava havt tørv á bæði realistum og idealistum fyri at komið hertil. Betri Stuðul byrjaði sítt virksemi í 2017 og vóru 5 milliónir avsettar til endamálið. Upphæddin hevur verið støðugt vaksandi, og í fjør vóru heilar 30 milliónir avsettar. Betri játtar umleið 50 umsóknum um árið – alt frá hjálparfelagsskapum og sjálvbodnum til risastórar verkætlanir so sum Føroya Arena. Orsøkin til, at Betri nú setur so nógvar pengar av til hetta, er júst tí at vit vilja viðurkenna, hvussu nógvir idealistar í grundini finnast í hesum pinkulítla landi. Hvør rekur allar teir sjálvbodnu hjálparfelagsskapirnar? Hvør setur nýggjar framsøknar fyritøkur á stovn? Hvør skipar fyri tónleikafestivalum og ger sjónvarpssendiróðir?

Tað er so ikki eg. Men vit í Betri hava tó sannlíkt stuðlað ella lænt hesum fólkum eitt oyra, so at tey kundu koma í gongd. Saman gera vit tað betri at búleikast her. Saman byggja vit vælferðarsamfelagið Føroyar.

# Eitt *samfelag* vit eiga í felag



**betri** banki   **betri** trygging   **betri** pensjón   **betri** heim


Idealistar og realistar ............ 2

ESG-tøl ............ 7

## Umhvørvið

Nýggjur orkuroknari ............ 11

Vit kunnu. Vit skulu ............ 21

Kantinan er góð fyri heilsuna – og samvitskuna ............ 28

## Kundin

Opið og gjøgnumskygt hjá kundanum ............ 9

Skjót sálarlig kreppuhjálp ... 10

Enn betri heim ............ 24

## Starvsfólkið

Betri starvsfólkaheilsa ............ 12

Felagið fyri starvsfólk eldri enn 60 ár ............ 21

## Samfelagið

Eg skilji ikki nógv – nógv skilja ikki meg ............ 14

Fyrstuhjálparskeið til allar 7. flokkar ............ 32

Tað liggur í blóðinum ............ 28

3 um árið eru 3 ov nógv ............ 30

# Okkara mál

## Vit raðfesta burðardygd

Vit vilja minka útlátið av vakstrarhúsgassi í minsta lagi 55% fyri 2030. Grøna orkuskiftið verður eisini framskundað, tá ið vit gera avtalur við kundar og starvsfelagar.

## Vit raðfesta ymiskleika

Ymiskleiki skapar menning og vøkstur. Starvsfólkahópurin og leiðslan hjá Betri skulu endurspegla føroyska samfelagið.

# ESG-lyklatøl

## Umhvørvi

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| $CO_2e$, scope 1 | 542 tons | 500 tons | 518 tons |
| $CO_2e$, scope 2 | 223 tons | 265 tons | 284 tons |
| Tilsamans $CO_2e$ | 765 tons | 792 tons | 802 tons |
| Varandi orka | 13% | 10% | 9% |
| Orkunýtsla | 9.865 GJ | 9.429 GJ | 9.808 GJ |

## Starvsfólk

| | 2022 | | 2021 | | 2020 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðsmegi, ársverk | 291 | | 291 | | 284 | |
| Kynsbýti | Kvinnur 61% | Menn 39% | Kvinnur 64% | Menn 36% | Kvinnur 63% | Menn 37% |
| Kynsbýti á leiðslustigi | Kvinnur 41% | Menn 59% | Kvinnur 41% | Menn 59% | Kvinnur 41% | Menn 59% |

## Kynsbýti í nevndum

| FELØG | 2022 | | 2021 | | 2020 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Kvinnur | Menn | Kvinnur | Menn | Kvinnur | Menn |
| Umboðsráðið | 17% | 83% | 11% | 89% | 11% | 89% |
| Betri Holding | 50% | 50% | 33% | 67% | 33% | 67% |
| Betri Banki | 67% | 33% | 67% | 33% | 67% | 33% |
| Betri Trygging | 60% | 40% | 60% | 40% | 60% | 40% |
| Betri Pensjón | 25% | 75% | 25% | 75% | 25% | 75% |
| Betri Heim | 33% | 67% | 33% | 67% | 33% | 67% |

## Uppmøting á nevndarfundum

| FELØG | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Umboðsráðið | 78% | 86% | 91% |
| Betri Holding | 98% | 96% | 98% |
| Betri Banki | 96% | 99% | 98% |
| Betri Trygging | 98% | 98% | 100% |
| Betri Pensjón | 100% | 100% | 100% |

*"Menn rinda millum 35 og 45% meiri inn til pensjónina – um mánaðin. Tað merkir eyðsæð, at teir eisini tjena nógv meiri."*

# Menn hølva kvinnur av á pensjónsøkinum

– Tølini lúgva ikki. Munurin á pensjónsupphæddini hjá kvinnum og monnum er ovurhonds stórur. Menn rinda millum 35 og 45% meiri inn til pensjónina – um mánaðin. Tað merkir eyðsæð, at teir eisini tjena nógv meiri, staðfestir Helgi L. Petersen, stjóri í Betri Pensjón. Hann hevur kannað munin á tí, sum kvinnur og menn hava at liva fyri, tá tey fara upp á pensjón.

- Tað eru umleið líka nógvar kvinnur sum menn, ið spara upp til pensjón hjá okkum. Kortini eiga menn munandi meiri av innistandandi pengunum, sigur Helgi L. Petersen og vísir á, at í yvirlitinum yvir tey 100, sum eiga mest samanspart hjá Betri Pensjón, eru 70 menn og bara 30 kvinnur.

- Hetta vísir, hvussu nógv nøkur fólk eiga, og tað vísir greitt, at menn eiga mest. Men tað, sum kanska er meiri vert at leggja til merkis, eru inngjøldini. Tí eisini har eru menninir munandi framman fyri kvinnurnar, og støðan stendur við og versnar, tí teir rinda so nógv meiri inn hvønn mánað.

Hesin ójavnin merkir í fyrra lagi, at menninir fara at hava munandi meiri at liva fyri, tá pensjónsaldurin kemur, enn kvinnurnar.

- Í seinna lagi merkir hetta, at vit hava ein strukturellan lønarójavnað, av tí at pensjónin er ein partur av lønini, staðfestir Helgi L. Petersen.

**Ymsar orsakir til skeivleikan**

Av møguligum orsøkum kunnu vit eitt nú nevna barnsburðarfarloyvi. Nógvar kvinnur fara niður í løn, tá tær fara í barsil, av tí at útgjaldsloftið er 25.000 krónur um mánaðin. Í 2022 er lógarkravda pensjónin 8%. Átta prosent av 25.000 er hjá fleiri væl minni, enn tær annars høvdu goldið inn til pensjónina.

Eisini vísir nýggj gransking, at nógvar kvinnur fara niður í tíð, eftir at børnini eru komin. Tað gevur teimum eyðsæð minni í løn – og tí eisini minni í pensjón.

Fakfeløgini hava somuleiðis víst á, at í fleiri sonevndum "kvinnustørvum" er trupult at fáa fullan arbeiðsbrøk hjá teimum, ið vilja arbeiða fulla tíð. Aftur her ávirkar tað pensjónina. Eisini er lønarlagið lægri enn í sonevndu "mannfólkastørvunum".

Tá munurin er so mikið stórur, og kvinnurnar mánað fyri mánað verða afturúrsigldar, hava vit eyðsæð nakrar grundleggjandi samfelagsligar skeivleikar, sum vit áttu at hugt nærri at og gjørt okkurt við, staðfestir stjórin í Betri Pensjón.









# Opið og gjøgnumskygt hjá kundanum

"Hvat verður av pengunum, sum eg hvønn mánað seti inn til pensjón?" Hetta er ein spurningur, ið mong seta. Hjá Betri Pensjón fæst greitt svar, tí her valdar 100% gjøgnumskygni.

Hóast hetta ikki er ein vanlig tænasta her um leiðir, so kanst tú hjá Betri Pensjón síggja, júst hvørji partabrøv og/ella lánsbrøv, tín pensjón er sett í – niður í minstu krónu.

Klikkir tú fáar ferðir inni á heimasíðu okkara, ber til at síggja hvørji feløg vit seta pengar tínar í, og hvussu pengarnir eru býttir millum ymsu feløgini.

Fyri okkum er tað natúrligt, at kundin skal hava fult innlit, tí vit eru sannførd um, at gjøgnumskygni er vegurin fram.

Vit eru errin av hesum opinleikanum – og vegleiða fegin, um onkur ivast.

**Vel og broyt váðastig**

Síðani virksemið byrjaði, hevur Betri Pensjón givið kundunum ávirkan á egin pensjónsviðurskifti. Eru fólk varin, kunnu tey seta sínar pengar á eitt varið váðastig. Eru fólk hinvegin meiri váðafús, kunnu tey seta sínar pengar á eitt høgt váðastig.

Vit síggja, at tað er ógvuliga ymiskt, hvat ið fólk velja, og tað stuðlar undir týdninginum av hesum valmøguleikanum. Vit eru jú so ymisk – eisini tá ið um pensjónsviðurskifti ræður.

Til ber eisini at broyta váðastigið, um tú vilt satsa eitt sindur meira, ella um tú hinvegin vilt toga eitt sindur í bremsuna. Tað er tínar pengar, vit umsita, og tí skalt tú hava ávirkan á, hvussu teir verða umsitnir.

**Síggj avkast, tryggingar og arvingar**

Hvønn mánað ber til at rita inn á okkara skipan og fylgja við, hvussu gongst við pensjónsuppsparingini og avkastinum.

Somuleiðis ber altíð til at síggja, hvørjar tryggingar tú hevur hjá okkum – og hvør arvar tína lívstrygging og tína pensjón, skuldi tað ringasta hent. Hetta eru viðurskifti, sum tú altíð kanst broyta.

## Nøgdsemiskanning millum starvsfólk




Eg eri væl nøgd/-ur við at arbeiða í Betri Banka




Eg kenni meg motiveraða/-n í mínum arbeiði




Um tvey ár ætli eg mær framvegis at arbeiða í Betri Banka



**Starvsfólk og kundar**

Vit leggja nógva orku í, at starvsfólkini skulu trívast væl. Góður trivnaður er ein fortreyt fyri, at vit kunnu veita kundunum góða tænastu. Trivnaður snýr seg um, at gerandisdagurin er góður, at uppgávurnar eru greiðar, og at samstarv og relatiónir eru góð.

Fyri at arbeiða miðvíst við hesum hava leiðararnir árligar starvssamrøður við síni starvsfólk. Harumframt verður áhaldandi arbeitt við at menna arbeiðsamboðini, soleiðis at gerandisdagurin gerst smidligari hjá starvsfólkunum.

Rættir førleikar eru somuleiðis ein liður í at veita kundunum bestu tænastuna. Tí skipa vit bæði fyri felags førleikamenning fyri øll – og førleikamenning ætlað einstaka starvsfólkinum. Regluligar kundakanningar verða eisini gjørdar í Betri Banka, soleiðis at arbeiðið altíð verður ment og lagt til rættis við tí í hyggju at tryggja nøgdar og trúgvar kundar.

**Næmingar í Betri Banka**

Á hvørjum ári vilja nógv ung gerast næmingar í Betri Banka. Vit hava síðan í 70-árunum tikið næmingar inn á mestsum hvørjum ári. Síðan 2007 hava vit havt 107 næmingar í læru. Av teimum arbeiða 33 útlærdir næmingar framvegis í samtakinum.

**Bíligari at velja burðardygd**

Vit vilja gera tað lættari og bíligari hjá okkara kundum at velja burðardyggastu loysnina.

Hóast vit hava hækkað renturnar seinasta árið, halda vit fram at bjóða kundum, sum keypa elbil fram um bensin- ella dieselbil, kundum, sum keypa bústað, sum verður hitaður við varandi orku, og kundum, sum gera bústaðarumvælingar, sum minka um orkunýtsluna, væl lægri rentu.

Harumframt hava vit havt tvey kvøld um burðardygd, har vit góvu kundum kunning og góð ráð um orkuskipanir, sólpanel og elbilar.

**Nýggjur orkuroknari**

Vit hava ment ein orkuroknara, sum ger tað einfalt hjá kundunum at kanna, hvussu nógv teir kunnu spara, við at leggja um til varandi orkuskipan.

Umframt roknaran hava vit á heimasíðuni sett fokus á burðardygd. Har sæst, hvørji átøk vit hava sett í verk fyri at gera tað lættari og bíligari at gerast meira burðardygg, og hvat vit gera fyri at minka um $CO_2$-útlátið hjá bankanum.

**Stuttflutt epli**

Í mai 2022 hittust starvsfólk við familju í Miðvági og settu niður sløk 750 kg av eplum. Nakrar mánaðir seinni komu tey saman aftur og fingu tá 4,3 tons av eplum upp aftur. Hetta átakið hava vit sett í verk fyri at fáa okkum at hugsa um okkara matnýtslu, og at maturin skal vera so stuttfluttur sum gjørligt.

Í fjør varð eitt starvsfólk sett at arbeiða miðvíst við burðardygd. Harumframt hava vit ein bólk við fýra starvsfólkum, sum arbeiðir við at gera bankan meira burðardyggan og samstundis hjálpir okkara kundum at gerast meira burðardyggir.



*Kynsbýti*

**Í Betri Banka starvast 211 fólk. Av hesum eru 68 prosent kvinnur og 32 prosent menn. Í teimum leiðandi størvunum í bankanum eru 10 menn og 8 kvinnur.**



# Fyrstuhjálpar-taskur til bátafólk

Á Bátafestivalinum í Vestmanna tóku starvs-fólk á Sjódeildini hjá Betri Trygging ímóti bátunum, so hvørt sum teir løgdu at, og lótu manningunum fyrstuhjápartaskur.

Tað gekk ikki long tíð, so vóru allar taskurnar avreiddar fegnum bátaeigarum. Fólk stúgvaðust saman um básin og tóku sera væl ímóti taskunum.

Eitt av aðalmálunum hjá Betri Trygging er at vera sjónlig og seta trygd á breddan, og Sjódeildin tosar dagliga við hópin av bátaeigarum og reiðarum. Tað er tó sjáldan, at høvi býðst at hittast andlit til andlits á bátabrúgvunum, áðrenn skaðin hendir.

Men í Vestmanna lá væl fyri at hitta bátafólkið undir røttu umstøðunum, og fólk vóru sera fegin um vitjanina, hugnaligu prátini og ikki minst fyrstuhjálpartaskurnar.






# Betri starvs-fólkaheilsa

**Fyribyrgjandi venjing**

Hjá Betri Trygging ganga vit høgt upp í, at starvsfólkini hava tað gott. Vit eggja teimum tí til at vera kropsliga virkin fyri at økja um egna vælveru og vera tilvitað um góða heilsu. Vit vita jú, at fyribyrging er besta viðgerðin.

**Fitness og fysioterapi**

Á Kongabrúnni er eitt væl vitjað fitnessrúm, og stundum hava vit havt ein persónligan venjara at leggja starvs-fólkunum lag á. Eisini kemur ein fysioterapeutur umleið annað hvørt ár at seta stólar og borð í rætta arbeiðs-hædd, mýkja eymar vøddar og vísa á fyribyrgjandi venjingar.

**Rennikappingar og -venjing**

Ígjøgnum árið eru fleiri ymsar rennikappingar, sum vit eggja starvsfólkunum til at taka lut í – eitt nú flagg-dagsrenningin og Faroe Express. Betri Trygging rindar luttøkugjaldið fyri tey, ið vilja luttaka, og skipar eisini fyri felags rennivenjing í vikunum upp undir kappingarnar, so at øll skulu klára at renna teinin. Undirtøkan plagar at vera stór – bæði millum teirra ið vilja kappast, og teirra, ið bara vilja vera við og koma á mál. Sama hvat málið er, skapar tað góða orku og gott samanhald, tá ið vant verður fram ímóti sama tiltaki.



# Stór skelkandi kanning um ung og prutl

Á aðalfundinum hjá Ráðnum fyri ferðslutrygd varð ein stór kanning um ung og prutl løgd fram. Betri Trygging hevði verið við til at gera kanningina, og vit ógvaðust við av úrslitinum. Tí gjørdu vit ein film, ið vit almannakunngjørdu, fyri at kunna foreldur og av-varðandi um prutlvanarnar hjá teimum ungu.

Kanningin vísti til dømis, at meiri enn annar hvør koyrir prutl uttan at hava koyrikort, triði hvør hevur fingið kropsligan skaða á prutlinum, og fimti hvør hevur koyrt ávirkaður.

Eisini sóu vit greitt, at tey ungu kenna seg ótrygg í ferðsluni, og at tey mangan kenna seg trýst til at gera ymiskt í ferðsluni, sum tey halda vera vandamikið, og sum fer um teirra mørk. Tey halda heldur ikki, at bilar í nóg stóran mun hava fyrilit fyri prutlum í ferðsluni.

Tølini samsvara við innanhýsis heildarmyndina hjá okkum, sum vísir, at alt fleiri prutl verða skrásett, og at boðað verður frá alt fleiri skaðum.

Kanningin varð løgd fram á aðalfundinum hjá Ráðnum fyri ferðslutrygd, har evnið var 'Ung og prutl'. Semja var um, at meiri má gerast fyri at kunna um trupulleikan. Somuleiðis má meiri gerast fyri at fyribyrgja mongu vansunum, sum tey ungu sjálv vístu á.

Betri Trygging og Ráðið fyri ferðslutrygd gjørdu kanningina í samstarvi við Uttanríkis- og mentamálaráðið. Allir næmingar í 8., 9. og 10. flokki vórðu spurdir um egnar prutlvanar og prutl-vanarnar hjá vinfólki.



*Kanningin vísti*

- → Meiri enn annar hvør koyrir prutl, uttan at hava koyrikort
- → Triði hvør hevur fingið kropsligan skaða á prutlinum
- → Fimti hvør hevur koyrt ávirkaður




# Eg skilji ikki nógv – nógv skilja ikki meg

Nær hugdi tú seinast í spegilin og spurdi: Hvør eri eg? Tað gjørdu Dánjal á Neystabø og Búi Dam herfyri. Tí spurninginum var ikki so einfalt at svara.

Dánjal á Neystabø og Búi Dam eru tvey nøvn, sum flestu børn í Føroyum kenna. Í mong ár hava teir sungið, fjákað og tvætlað, men eisini lært frá sær: Úr Ævintýraferðini frá 2012: Eg skilji ikki nógv. Og nógv skilja ikki meg. Summi skilja fisk. Eg skilji ikki fisk. Men eg skilji í øllum førum eitt. Og tað eri sibbi dibbi dimm dimm, dubba damm damm, kragga ding ding.

At síggja til kann nýggjasta barnasendirøðin í Kringvarpinum, 6 spurningar um at vera menniskja, tykjast sum bert ein vanlig sendirøð fyri børn. Tveir menn – annar í gulum klædningi og hin í grønum. Teir eru eitt sindur fjákutir. Teir eta mold. Teir saga hvønn annan í helvt. Men so steðga teir á, tí nú komu teir fram á ein spurning. Ein spurning, sum vit vaksnu heldur ikki reiðiliga kenna svarið upp á.

– Hetta er ikki bara fyri børn, sigur Dánjal. Hetta er ein sendirøð fyri droymarar. Fyri øll, sum halda, at spurningar eru meira áhugarverdir enn svar.

– Vit hava ongantíð nakra ítøkiliga ætlan ella niðurskrivaða endamálsorðing, áðrenn vit fara í gongd. Hvørki á palli ella við verkætlanum sum hesari. Og tað er nettupp poengið. Vit eru leitandi. Vit hugsa hart. Hetta ger, at onnur síðani forvitnast og koma við okkum á hesa ferðina. Og í felag finna vit so fram til 'teir stóru spurningarnar'.

– Tað, sum er stuttligt, er, at børn duga ofta betur enn vit vaksnu at fyrihalda seg til slíkar spurningar. Børn eru nevniliga ikki fastlæst í sínum egnu tankamynstrum eins og vit vaksnu. Tey hugsa ikki frammanundan, at "har finst einki svar, so hví yvirhøvur geva slíkum spurningum gætur?". Og júst her kunnu vit vaksnu læra av børnunum. Tí tað er nokk so vanligt, at lærarar og foreldur eru tey, sum hava 'svarini', meðan næmingar og børn eru tey, sum seta spurningar.

Men um vit vaksnu kunnu góðtaka, at vit ikki altíð noyðast at fáa nakað svar, so kunnu vit knappliga tosa um nógv fleiri ting – so sum hesar seks spurningarnar, ið verða viðgjørdir í sendirøðini.

– Hetta er onkursvegna kjarnin í sendirøðini. At tosa saman og undrast saman. Finna fram spurningar, sum lata upp fyri tíggju nýggjum spurningum. Búi og eg eru saman í hesi leitanini, og júst tað vísir seg at vera týdningarmikið. Tað er ikki so farligt, um vit grunda yvir spurningarnar upp á hvør sín máta. So leingi vit grunda yvir sama spurning og finna fram til somu niðurstøðu. Júst hetta samanhaldið er neyðugt at duga. Tí meðan vit í dagsins samfelag eru vorðin upptikin av okkum sjálvum við sjálvprofilering og selfies, so er skjótt at gloyma, at vit øll virka saman í einum størri felagsskapi.

– Til dømis var tað Betri, sum stuðlaði hesum tiltakinum. Tað vóru vit fegin um, sjálvandi, men við at stuðla okkum vísir Betri á, at eisini tey eru ein felagsskapur, sum virkar í einum uppaftur størri felagsskapi – Føroya landi. Og soleiðis eigur tað eisini at vera. Alt hongur saman. Betri letur okkum eitt oyra, so vit fáa breyð á borðið, men afturfyri fær alt tað føroyska samfelagið eina sendirøð, sum vónandi ger tað eitt sindur stuttligari at vera barn í Føroyum. Soleiðis eigur tað at vera í einum vælferðarsamfelag, spyrt tú meg.




# Sjógvurin býr í okkum

Er tað nakað, sum eyðkennir Føroyar, so er tað sjólívið. Og hvar í Føroyum finnur tú fleiri sjófólk enn í Klaksvík? Og á hvørjum øðrum degi enn á sjálvum sjómannadegnum?

Sjómannadagurin er ein dagur, sum føroysk sjófólk á hvørjum ári seta kross við í kalendaranum. Ein dagur, har ið stórar fyritøkur koma at gera vart við seg, og har ið barnafamiljur úr øllum landinum leita sær til høvuðsstaðin í Norðuroyggjum at stuttleika sær.

– Tíðirnar eru broyttar, sigur Eyðstein Poulsen, ið er fyriskipari. Tá eg var smádrongur, gingu vit og mólu í fjøruni, vit fangaðu krabbar og forvitnaðust, tá ið skipini komu og fóru, hvat teir høvdu fingið á túrinum. Í dag vita børn ikki, hvussu ein skrubba sær út, sigur Eyðstein hálvavegna í skemti, men eisini í álvara fyri nettupp at leggja dent á týdningin av einum degi sum sjómannadegnum. Hann er tó skjótur at leggja afturat, at námsfrøðingar í hesum landinum eiga herðaklappið uppiborið, tí teir gera nógvar túrar við børnum bæði í fjøru og haga.

Hóast Sjómannadagurin skal eitast at vera fyri fólk, sum arbeiða á sjónum, so er tað ikki so. Sjómannadagurin er fyri øll, slær Eyðstein fast.

– Vit hava øll í Føroyum eitt tilknýti til sjógvin. Tá ið vit sita við køksvindeygað og líta út á hav, sum um svarini upp á okkara spurningar finnast har úti onkrastaðni, so gerst sjógvurin onkursvegna okkara fylgisveinur – uttan at vit vita av tí. Sjógvurin rúmar og endurspeglar okkara kenslur og okkara sinnalag. Okkara sorg og saknur búgva inni í mjørkanum. Okkara undran flýgur úteftir undir mánalýsinum. Okkara friðsæla dansar í silvitninum á morgni. Nei, nú geri eg ov nógv av, men eg meini bara, at tað eru ikki bara tey, sum standa úti á dekkinum, sum hava eitt tilknýti til sjógvin. Sjógvurin býr djúpt í øllum oyggjafólkum, eisini fyri tað um vit ikki halda fiskivinnu vera eitt áhugavert samtaluevni.

– Vit fara at hava eina serliga uppgávu í sambandi við at skipa fyri Sjómannadegnum í ár. Ein av fyriskiparunum er nevniliga ikki millum okkara longur: mín góði vinur, Karl Birgir Isaksen. Vanliga hava tað verið hann og eg, sum hava samskipað Sjómannadagin, sigur Eyðstein stillisliga, áðrenn hann heldur fram.

– Hann og eg høvdu tað í felag, at vit tímdu ikki at sita á reyvini og bíða og fundast allan dagin. Vit vildu heldur tjumsa avstað við fullari ferð. So kundu vit biðja um umbering aftaná, um vit traðkaðu á tærnar á hvørjum øðrum, flennir hann.

– Tað er bara soleiðis, vit skipa fyri tingunum her norðuri. Og tað hevur riggað onkursvegna. Tí Sjómannadagurin er vaksin hvørt ár, og í fjør var undirtøkan methøg.

# Skjót sálarlig kreppuhjálp

Hóast sálarligt mein ikki sæst, merkir tað ikki, at tað ikki er har. Vit vita, at vit kunnu fáa tað, um vit uppliva okkurt ógvisligt – og vit vita, at tað kann gerast álvarsamt, um tað ikki verður viðgjørt. Tí fór Betri Trygging í 2022 at bjóða upp í 10 tímar av kreppuhjálp hjá sálarfrøðingi í sambandi við ógvisligar hendingar og vanlukkur.



## Tá ið barnsburðurin ikki gongur eftir vild

At gerast foreldur er vanliga eitt tað besta, menniskju kunnu uppliva. Júst tí er andsøgnin so stór, tá ið barnsburðurin ikki gongur eftir vild.

Um barnið er deyðføtt ella doyr stutt eftir føðing, bjóðar Betri Trygging foreldrunum sálarliga kreppuhjálp, so tey betur fáa fótað sær aftur eftir svára missin. Tað sama gera vit, tá ið talan er um fosturlát, ella um barnið vísir seg at bera brek.

Eisini kann føðingin sum heild bara ganga illa og seta seg sum ein skuggi í sinnið – ella kann føðitunglyndi raka foreldrini. Hendir hetta, ávirkar tað eyðsæð alla familjuna og minkar um gleðina um nýfødda lívið. Eisini her er góð hjálp at fáa hjá sálarfrøðingi, so árinini ikki gerast so ógvislig.

Betri Trygging veitir upp í 10 tímar hjá sálarfrøðingi, um føðingin ikki gongur sum ætlað. Hetta er ein fastur partur av vanlukkutrygginini.



## Skriðulopið í Klaksvík

Beint fyri jól í 2022 rakti ógvisliga veðrið hart. Eftir nógvan kava fingu vit grimdarregn, sum elvdi til stór skriðulop fleiristaðni í landinum, tó serliga í Klaksvík og Norðuroyggjum.

Fólk í hópatali vórðu í skundi flutt burtur úr húsi og heimi, tí vandin var so stórur. Til alla lukku hendi eingin fólkaskaði, men materiellu skaðarnir vóru bæði nógvir og stórir. Slíkar ógvisligar hendingar og stóra óvissan kunnu seta seg í sinnið og ávirka í langa tíð.

Tí bjóðaði Betri Trygging sínum kundum bráðneyðuga sálarfrøðiliga kreppuhjálp tvey kvøld á rað eftir skriðulopini.




## Atsóknin í Fields

Eitt óskiljandi, óvæntað og harðrent álop á ósek fólk í handilsmiðstøðini Fields í summar, sendi ein ógvisligan skelk ígjøgnum alt ríkið. Nógvir føroyingar høvdu samband við hendingina – antin tí teir sjálvir vóru í Fields, tá ið álopið hendi, ella tí tey varðaðu av onkrum, sum var har.

Tá ið av tornaði, doyðu trý fólk av skotunum, og fýra vórðu særd. Men avleiðingarnar kunnu tó eisini vera svárar fyri tey, ið ikki sjálv vórðu rakt av skotunum. Ein slík kreppustøða kann fáa varandi avleiðingar, um ikki rætta hjálpin fæst sum skjótast.

Dagin eftir sendi Betri Trygging kunning út, um at okkara kundar fingu bráðneyðuga sálarfrøðiliga kreppuhjálp alt fyri eitt. Harafturat bjóðaðu vit okkara kundum at tosa við sálarfrøðing í tíðini eftir skottilburðin, tá ið fyrsti skelkurin hevði lagt seg.



# Kantinan er góð fyri heilsuna – og samvitskuna

Árstíðir, stuttflutt og minni matoyðsl eru alt viðurskifti, ið dagliga verða tikin við í arbeiðið í kantinuni hjá Betri Trygging. – Vit leggja okkum eftir ymsum sløgum av burðardygd, staðfestir Richa Richardsdóttir, dagligur leiðari í kantinuni.

**Eta stuttflutt**

– Fiskurin er altíð føroyskur, og onkuntíð eisini kjøtið. Herfyri gjørdu vit avtalu við ein føroyskan grønmetis-veitara, so eisini grønmetið fer at verða heystað í Føroyum, greiðir Richa frá.

Hon roynir at troyta teir møguleikar, ið eru, fyri at skaffa føroyskan mat, men tað er ikki so lætt at fáa hendur á lokalan mat til eina kantinu, sum skal metta nógv fólk.

– Men nú hoyrast fleiri politikarar siga, at tað skal gerast smidligari at keypa okkara egna. Vit vóna, at tað kemur ígjøgnum, tí so fara vit nokk at eta væl meiri av føroyskum, staðfestir hon.

**Eta eftir árstíðunum**

Um heystið eta vit náta og um veturin rótfrukt. Maturin í kantinuni fylgir árstíðunum.

– Vit leggja okkum altíð eftir at eta eftir árstíðini. Tú fært størsta nyttu úr matinum, tá ið hann er nýggjur og hoyrir árstíðini til. Tað er jú ikki serliga burðardygt at keypa mat, ið ikki natúrliga hoyrir eini árstíð til, vísir Richa Richards-dóttir á.

**Minni matoyðsl**

Hvønn fríggjadag er tað "Vikan, ið fór", og tá verða restir frá vikuni hitaðar upp aftur.

– Vit hava sjálvandi førleikarnar til at meta um, hvussu nógvur matur skal gerast, tí vit eru báðar útbúnar. Men vit laga eisini støðugt til. Eisini hava vit eina meginreglu um, at verður okkurt uppi, ja, so kunnu fólk altíð fáa sær av onkrum øðrum, greiðir Richa frá.

Og loypur nakað av, nýta tær tað. Er til dømis nógv salat, angar sannlíkt væl av grønmetisbreyði dagin eftir.

– Vit hava ómetaliga lítið matoyðsl, tá ið hugsað verður um, hvussu nógvur matur verður gjørdur her hvørja viku, staðfestir Richa.

**Heilsuburðardygd**

Kantinumaturin í Betri Trygging fylgir grundreglunum hjá Kræftens Bekæmpelse.

– Tað er ein góð samanseting av heilsugóðum mati, sum fylgir øllum fakligum tilmælum. Tað haldi eg eisini kemur undir burðardygd – hetta, at fólk fáa ein kost, ið ger tey sunn og frísk. Eg kann ikki gera av, hvat tey eta, tá ið tey hava frí. Men tá ið tey eru til arbeiðis, skulu tey fáa heilsu-góðan mat, so tey orka og ikki gerast sjúk av tí, tey fáa, staðfestir Richa.



# Felag fyri starvsfólk eldri enn 60 ár

Starvsfólk hjá Betri Trygging og Betri Pensjón, ið eru eldri enn 60 ár – og fyrrverandi starvsfólk, ið eru farin frá eftir 60 ára aldur - hava nú fingið eitt nýtt áhugafelag.

Felagið hevur fingið søguliga heitið "Tryggingar-sambandið", tí endamálið er at skapa samband millum fráfarin og verandi starvsfólk umfremt millum fráfarin starvsfólk og arbeiðsplássið.

- Vit vita, at tað ofta er ein kollvelting at fara av arbeiðs-marknaðinum. Fólk missa við eitt sín fakliga samleika, sítt sosiala lív við starvsfeløgum umframt skipaða gerandisdagin, sum tey eru von við. Við Tryggingа-sambandinum vilja vit gera skiftið frá arbeiðslívi til pensjón betri og smidligari, greiðir Ingunn Eiriksdóttir, stjóri í Betri Trygging, frá.

HR-deildin hevur sparrað við elstu starvsfólkini um, hvussu seinastu árini á arbeiðsmarknaðinum skulu skipast, og hvat kann gerast fyri at lætta um skiftið. Eitt stig í hesum er felagið Tryggingarsambandið.

– Felagið skipar fyri tiltøkum og gevur limunum møgu-leika at stuðla og ráðgeva hvør øðrum, eitt nú í pensjóns-viðurskiftum. Eisini kunnu vit eftir tørvi skipa fyri fakligari sparring og mentortiltøkum, har eldri og fráfarin starvs-fólk vegleiða yngri starvsfólk, sigur Rannvá Justinussen, HR-leiðari hjá Betri Trygging og Pensjón.

Nevndin í nýggja Tryggingarsambandinum hevur skipað seg, og undirtøkan er sera góð. Hóast felagið ikki hevur fylt eitt ár enn, hevur tað longu skipað fyri fleiri tiltøkum.



## Endamálið við Tryggingar-sambandinum

→ **At fremja samanhald** millum limirnar í felagnum

→ **At stuðla hvør øðrum** og ráðgeva í málum, sum hava ávirkan á penjónsviðurskifti o.a.

→ **At stuðla Betri Trygging og Pensjón** við fakligari sparring og møguligum mentortiltøkum

→ **At skipa fyri** hugnaligum og mentanarligum tiltøkum o.ø.

# Ein erlig søk

## Hvat kunnu vit gera fyri at gerast burðardygg? Í høvuðsheitum snýr tað seg um, at vit ikki skulu keypa og brúka meira enn hægst neyðugt. Og vit skulu nýta burðardyggastu tøknina til tað, vit ikki kunnu vera fyri uttan.

Tað eru ikki meira enn fýra ár síðan vit av álvara fóru at hugsa um, hvussu okkara virksemi ávirkar umhvørvið. Nógv er hent hesi fýra árini, bæði við tøkniligu menningini og við okkara hugburði og virksemi. Vit hava lagt nógva orku í at skilja, hvussu okkara virksemi ávirkar umhvørvið, so at vit kunnu og hava eina greiða ætlan fyri, hvussu vit minka okkara $CO_2$-útlát 55% fyri 2030. Vónandi fyrr, um alt gongur sum ætlað.

Vit eru farin undir fleiri átøk, sum vit vita minkar um okkara útlát, minka um orkunýtsluna og minka um okkara matoyðsl. Men vit eru ikki komin á mál. Tað vita vit eisini. Tí halda vit fram at leggja nógva orku í at røkka okkara máli um at gerast $CO_2$-neutral fyri 2050.

Samstundis sum vit arbeiða við at minka um útlátið hjá bankanum, hava vit eisini gjørt tað lættari og bíligari hjá okkara kundum at velja burðardyggar loysnir, bæði gjøgnum útlánsvirksemi og íløgur.

Burðardygt Vinnulív er eitt samtak við 12 føroyskum fyritøkum, sum standa saman og hjálpa hvørji aðrari at gerast meira burðardyggar. Vit hittast javnan fyri at luta vitan okkara millum, læra av hvørjum øðrum og hjálpa hvørjum øðrum at halda fram við góðu gongdini. Samstarvið leggur samstundis eitt ávíst trýst á okkum og eggjar okkum at leggja enn meira orku í at gerast burðardygg.

Síðan Burðardygt Vinnulív varð stovnað, er okkara ferð at gerast burðardygg av álvara byrjað. Vit hava sett okkum sum mál at minka um okkara beinleiðis ávirkan á umhvørvið og lívfrøðiliga margfeldið og hava eina greiða ætlan fyri, hvussu vit røkka hesum málum fyri 2030. Vit eru somuleiðis farin at menna nýggjar, burðardyggar tænastur, sum fara at ávirka alt okkara kundavirksemi komandi árini.

Sostatt er burðardygd vorðin partur av gerandisdegnum og virkiskarminum hjá okkum. Tað sæst aftur í átøkunum, vit hava framt, og teimum mongu, sum eru fyri framman.

**Hvussu kunnu vit gera mun?**

Okkum er greitt, at okkara størsta ávirkan á umhvørvið stendst av okkara vinnu- og privatkundafígging. Beinleiðis útlátið hjá bankanum er lítið samanborið við útlátið, sum stendst av virkseminum, sum vit eru við til at fíggja. Kortini hava vit sett okkum fyri fyrst at skerja okkara beinleiðis útlát, so at vit betur skilja og fáa hjálpt okkara kundum at minka um teirra útlát.

**Broytingar til frama fyri umhvørvið**

Vit hava eina greiða ætlan fyri, hvussu allar okkara deildir fáa varandi orkuskipanir, og ætlanin er, at broytingarnar verða framdar fyri 2030.

Deildirnar hjá okkum yviri við Strond 4 og í Miðvági fingu báðar jarðhita í 2022. Harumframt fekk deildin í Miðvági sólpanel í desembur. Longu nú eru úrslitini sera góð, og vit vænta, at deildin verður sjálvbjargin við varandi orku í minsta lagi helmingin av árinum.

Deildin yviri við Strond 4 verður umvæld í ár, og vit vænta, at hetta fer at minka munandi um orkunýtsluna.

Vit hava keypt ein elbil afturat til starvsfólkini at brúka í arbeiðsørindum, og bankin hevur nú tríggjar elbilar tilsamans. Samstundis verður arbeitt við at fáa starvsfólki og kundum á deildini yviri við Strond 2 í Havn løðistøðir.



BURÐARDYGT VINNULÍV

**Nýggjur roknari hjálpir okkum at staðfesta $CO_2$-útlátið**

Sum limur í Burðardygt Vinnulív hava vit stuðlað Umhvørvisstovuni fíggjarliga í at menna ein nýggjan roknara, sum vinnufyritøkur kunnu brúka til at rokna sítt $CO_2$-útlát.

Roknaran hava vit m.a. brúkt til at finna út av, hvussu stóra ávirkan okkara virksemi hevur á umhvørvið.

Til at hjálpa okkum at staðfesta okkara útlát og fáa greiðu á, hvat vit eiga at gera fyri at gerast $CO_2$-neutral, hava vit brúkt henda roknaran og gjørt eina ESG-frágreiðing. ESG stendur fyri Environment (umhvørvið), Social (starvsfólk og kundar) and Governance (leiðsla). Frágreiðingin fevnir sostatt bæði um nágreinilig hagtøl fyri okkara útláti, og um, hvussu vit gera tað lættari hjá starvsfólki og kundum at gerast meira burðardygg.

# Enn betri heim



### Betri Heim

Betri Heim rekur øðrvísi virksemi enn restin av Betri-familjuni. Í Betri Heimi selja vit fastogn, og hóast vit ikki eiga vøruna sjálv, men umboða seljaran í sambandi við søluna, so vilja vit eisini geva okkara til at gerast orku- og umhvørvisvinarligari.

### Orkumerkt sethús

Vit vildu fegin sett orkumerki á sethúsaognirnar, ið vit selja. Í londum kring okkum finnast orkuskráir, har sethúsaognir verða orkumerktar. Slík skrá finst ikki í Føroyum enn, og um politiskur vilji er til tess, vilja vit í Betri Heimi eina slíka skrá og vilja gera okkara íkast at orkumerkja føroysku sethúsaognirnar.

### Eitt grønari heim

Innanhýsis gera vit okkara til at hugsa umhvørvisvinarligt. Vit hava ment talgildar skipanir til skjøl og boðgeving, so minni verður skrivað út á pappír. Í tí heilt smáa kann nevnast, at vit brúka felags ruskílat heldur enn at hava ruskíløt undir hvørjum skriviborði. Vit reisast oftari av stólunum, og talið á ruskposum er minkað úr 2080 niður í 520 um árið.

### Allur bati bøtir

Betri Heim hevur tikið avgerð um at skifta bensin- og dieselbilarnar út við elbilar, næstu ferð bilar skulu keypast, ella áðrenn tvey ár eru liðin. Hetta fer at gera sítt til, at vit sum arbeiðspláss gerast meira orku- og umhvørvisvinarlig.

## Nøgdsemiskanning millum starvsfólk




### Starvsfólkatrivnaður og kundaloyalitetur

Betri Heim ger regluligar starvsfólka- og kundanøgdsemiskanningar.

Vit miða eftir at hava so góðan starvsfólkatrivnað sum gjørligt.

Úrslitið í seinastu kundanøgdsemiskanning var 93%, sum gevur okkum eina góða ábending um, at okkara kundar eru væl nøgdir og trúgvir.

Vit arbeiða støðugt við virkis- og førleikamenning og leggja stóran dent á at lurta eftir okkara kundum og menna okkara skipanir eftir teirra ynskjum, samstundis sum vit førleikamenna starvsfólkið við røttum og viðkomandi útbúgvingum.

Rudda Føroyar

# Eingin kann gera alt. Øll kunnu gera okkurt

Hvønn leygardag um hálvan septembur brynja meira enn 1000 sjálvboðin børn og vaksin seg við góðum útiklæðum. Við posa í hond fara tey út at henta rusk, sum sløðist í føroysku náttúruni. Eftir bara fimm árum hava tey megnað at ruddað meira enn hundrað tons av ruski.

– Tað einasta, sum krevst, er ein hugburðsbroyting. Vit vita jú, hvat trupulleikin er: plast. Og tað sløðist allastaðni í náttúruni – einnýtisbúnýti, pakkitilfar, plastposar, sigur Sigrun Mohr, stigtakari.

– Eg gekk mær ein túr yviri við Strond síðsta sunnudag – eg havi altíð ein posa við mær – og tað var meginparturin plast.

– Vit fáa nógv góð orð frá øllum. Móttøkan hevur verið góð.

– Men mong virða hetta ikki og eru enn eitt sindur líkasæl. Tí rusk sløðist við sama lag. Vit samstarva við tunnilsfelagið, sum hevur sent okkum myndir, og tað er eitt øgiligt órudd, sum sløðist í føroysku tunlunum – enntá pitsueskjur, sum nóg illa sleppa út gjøgnum bilrútin.

– Slagorðið er: Eingin kann gera alt. Men øll kunnu gera okkurt. Varð hetta hugburðurin millum fólk, lá einki rusk og misprýddi okkara vakra land, staðfestir Sigrun.

– Ruddingardagur er bara ein einstakan dag um árið. Men hvussu er við hinum 364 døgunum? Tað eru jú mong, sum dagliga ganga sær ein túr – við hundi ella vinfólki. Kanska tað kundi verið eitt hugskot at tikið ein posa við næstu ferð.

– Eg plagi eitt nú at ganga túr við ommusoninum, og tá hava vit altíð ein posa við okkum. Nú er hann farin at rópa "Omma, hygg!", hvørja ferð hann sær rusk. Soleiðis eru børn – tey síggja tað, sum vit síggja.

– Tað eru bara fimm ár síðani vit stovnaðu felagið. Longu nú hevur Rudda Føroyar ment seg til at vera eitt árligt tiltak, sum alt fleiri eru farin at taka í álvara. Felagið fer í næstum at hava almennan aðalfund, og har vera bæði landsstýriskvinnan, Ingilín D. Strøm, fakfólk hjá IRF og Bjørg Dam úr umhvørvisnevndini í Tórshavnar kommunu við.

– Betri var okkara høvuðsstuðul tað fyrsta árið. Tað var fantastiskt. Og í ár hava tey stuðlað okkum við 50.000 krónum, sum vit eru sera takksom fyri. Tað kemur sera væl við, tí meginparturin av arbeiðinum er jú sjálvboðin, sigur Sigrun fegin at enda.














Myndir: Rudda Føroyar



Gransking

# Tað liggur í blóðinum

Gransking vísir, at alt ov nógvir føroyingar hava ov høgt kolesterol. Vanlig fatan hevur leingi verið, at er kolesterolið ov høgt, hongur tað saman við vánaligum kosti ella lívsstíli. Sanna á Borg, lækni á Landssjúkrahúsinum, hevur nú í síni ph.d.-ritgerð um ættar-hyperkolesterolemi sett spurnartekn við, um høgu kolesteroltølini í Føroyum kunnu forklárast við arvi – eins og CTD og navnframa føroyska sjúkan.

*Tað finst einki miðaltal fyri kolesterol, tí tað er ymiskt frá persóni til persón, og onnur viðurskifti spæla inn, eitt nú høgt blóðtrýst, sukursjúka og royking.*

– Í dag eru vit tíggju ferðir so nógv fólk í Føroyum, sum vit vóru fyri knøppum tveimum øldum síðani. Vit eru sostatt góð 50.000 fólk, sum stava frá teimum somu 5.000 forfedrunum. Tað merkir, at vit í Føroyum hava eina ógvuliga homogena ílegupulju, har vit øll meira ella minni hava arvað teir somu eginleikarnar – eisini teir óhepnu arvaeginleikarnar, sigur Sanna.

– Ílegufrávik í Føroyum eru einki nýtt. Vit kenna øll CTD og føroysku sjúku. Men tá ið vit fóru at kanna kolesteroltølini, sóu vit, at tølini vóru sera høg. Men tað mesta áhugaverda var, at av teimum 30.000 føroyingunum, vit kannaðu, hevði áttandi hvør møguliga arvað høga kolesterolið. Vanlig fatan hevur altíð verið, at hevur tú ov høgt kolesterol, er tað knýtt at vánaligum kosti ella lívsstíli. Hetta birti undir spurningin, um tað kann vera arvaligt at hava ov høgt kolesterol, sigur Sanna, meðan hon lyftir krússið uppfrá og blæsur varliga niður í tað, áðrenn hon setur tað frá sær aftur uttan at hava drukkið úr tí.

– Eg mátti tí gera eina rúgvu av kanningum við fólkum, sum høvdu ov høgt kolesteroltal, umframt samanberingar millum ymiskar bólkar av fólkum. Eg væntaði at finna eitt føroyskt ílegufrávik, sum kundi forklára hesi høgu kolesteroltølini. Men tað fann eg ikki. Hesum var eg nokkso ovfarin av.

– So tá ið eg nú kom til aðra niðurstøðu, enn eg hevði væntað, mátti eg kanna ymiskt annað. Eg kannaði kostin, og um tey ótu meira av mettaðum feitti osfr. Eg hugdi eisini at lívsstílinum – um tey íðkaðu minni og høvdu ov høgt BMI. Har kom tað tó sera óvart á, at tey, sum ótu sunnari, høvdu hægri kolesteroltøl.

– Hjá 60% av teimum, sum vóru við í kanningini, fann eg smærri broytingar í nógvum ílegum. Eg fann sostatt ikki bara eitt ílegufrávik, men fleiri smærri ílegufrávik. Og hesi kunnu væl forklára høga kolesterolið, og tað er eisini arvur í tí. So tað gevur meining. Mangir løkir smáir gera stórar áir, sigur Sanna og smílist. Nú er krússið hjá henni tómt.

– Hetta er slóðbrótandi gransking á økinum. Betri var sinnað at stuðla, tí granskingin kemur jú undir fyribyrging – hetta er hjartasjúkufyri-byrgjandi gransking. At kanna ílegur kostar rættiliga nógv, so tá ið 300.000 krónur vórðu játtaðar til verkætlanina, gjørdist eg ovurfegin. Stuðulin hevur havt stóran týdning – bæði fyri granskingina og meg sjálva, tí tað er hugaligt at vita, at vit í Føroyum hava stovnar, sum síggja virðið í gransking. Tað er heilt fantastiskt.



**Vilt tú hugsa meira um kolesterolið, mást tú hugsa meira um, hvussu tú livir.**

- Et minni av mettaðum feitti
- Et minni av hvíttum breyði og sukri
- Drekk minni av alkoholi
- Rør teg meira



# 3 um árið eru 3 ov nógv

**Umframt at vera í uppskoti til tað longsta orðið á føroyskum var druknuvanlukkufyribyrgingardagurin, sum varð hildin 25. juli í fjør, eitt gott íkast til at skapa meira tryggleika í Føroyum.**

*"Flest fólk drukna, meðan tey eru einsamøll. Í summum førum hevði støðan kunnað verið ein onnur, um onkur var hjá."*

– Einir tríggir føroyingar drukna um árið. Tað er sera nógv í mun til fólkatalið. Flestu vanlukkurnar henda, meðan fólk eru einsamøll. Øll eiga at vita, hvussu tú svimur, hvussu tú bert teg trygt at í vatni, og hvussu tú bjargar øðrum frá at drukna – serliga tá ið tú býrt í einum oyggjalandi, har tú sært sjógvin beint gjøgnum køksvindeygað, sigur Rókur í Jákupsstovu, sum er formaður í Svimjisambandi Føroya.

Druknivanlukkufyribyrgingardagur er ein altjóða dagur, har ið felagsskapir og myndugleikar kring allan heim gera vart við druknivanlukkur. Eitt, sum knýtir alt átakið saman, er, at ymisk eyðkennismerki í hvørjum landi verða lýst upp við bláum ljósi, tá ið líður út á kvøldið.

– Trupulleikin hjá okkum var sjálvandi, at 25. juli er á hásumri, og her í Føroyum er ikki nóg myrkt til at lýsa nakra standmynd ella annað eyðkennismerki upp. Vit valdu tí at lýsa undirsjóvartunnilin upp við bláum ljósi. Tað var kanska ein neyðloysn, men onkursvegna var tunnilin sera hóskandi – hann er jú undir sjónum.

– Tað var serliga einum høvuðssetningi, vit vildu hava fólk at sita eftir við: "Hav onkran við tær." Meg minnist í 2014, tá ið føroyingar tilnevndu hvønn annan at leypa á bláman. Tað var tað heilt stóra upplopið, og øll gjørdu tað – eldri, ung, kend og ókend. Tað hóvaði okkum sum vera man ikki í Svimjisambandinum, men hóast nógv fingu skaða, druknaði eingin. So kunnu vit spyrja hví – var tað, tí at tey nettupp ikki vóru einsamøll? Har stóðu jú vinfólk og filmaðu og hugdu at, og kanska var júst tað trygdin í tí.

– Vit føroyingar hava eitt serligt tilknýti til havið. "Havið gevur, og havið tekur," sigur orðatakið. Druknar onkur, rættvísgera vit tað og siga, at vit búgva so nær við sjógvin, at tað slepst ikki undan slíkum vanlukkum. Tað passar bara ikki altíð. Flest fólk drukna, meðan tey eru einsamøll. Í summum førum hevði støðan kunnað verið ein onnur, um onkur var hjá.

– Eini onnur góð ráð eru at læra seg at svimja – og at svimja regluliga. Og um áhugin ikki er fyri tí, so um ikki annað at koma og royna seg eina ferð um árið, tá ið vit hava 200 metra svimjing. Norðurlendski svimjistandardurin er 200 metrar uttan steðg, og hetta mæla vit í Svimjisambandinum øllum til at royna.

– Eg havi hoyrt sjófólk siga, at tað kann gera tað sama, um tey duga at svimja. Detta tey fyri borð, drukna tey undir øllum umstøðum. Tað er eisini rætt – um altso vanlukkan hendir í Barentshavinum. Men hagtølini vísa, at flestu druknivanlukkur henda ikki í Barentshavinum. Tær henda við bryggjukantin, sigur Rókur og steðgar á eina lítla løtu, áðrenn hann heldur fram:

– Og tær nýtist altso ikki at vera nakar Pál Joensen fyri at svimja 200 metrar uttan steðg. At duga at svimja er bæði stuttligt og frískligt. Tað er gott fyri likam og sál, og so kann tað bjarga lívinum.

– Vit eru sera fegin um, at Betri lat okkum stuðul, so vit kundu varpa ljós á hetta. Tað loyvi eg mær at siga – ikki bara vegna Svimjisambandið, men væntandi vegna okkum øll, sum búgva her í Føroyum, sigur Rókur at enda.



## Soleiðis fyribyrgja vit drukni-vanlukkum

Sama um tú fert at svimja, dyppa, stinga fliður í fjøruni, ein stimitúr, oman í bátin ella ein kaitúr,

**– so hav altíð onkran við tær.**

At hava onkran við ger allan munin. Tí nógv tær flestu druknivanlukkurnar í Føroyum henda, meðan fólk eru einsamøll. Og ofta beint við bryggjukantin.

# Fyrstuhjálparskeið til allar 7. flokkar

Skuldi tú verið fyri eini vanlukku í næstum, so er at vóna, at onkur tannáringur er í nánd. Tí í seinastuni hava allir 7. flokkar í Føroyum nevniliga fingið undirvísing í fyrstuhjálp. Hví 7. flokkar? – Ja, hví ikki?



7. flokkur í Skúlanum við Løkin er ein av 7. flokkunum, sum hava fingið fyrstuhjálparprógv millum jól og páskir.









*"Fyribyrgjandi arbeiði er ein av grundsúlunum undir Betri stuðli, og vit eru errin av hesum samstarvinum við Reyða Kross og Undirvísingarstýrið."*

– Aslaug Gísladóttir, nevndarforkvinna í Betri

Tá ið Betri og Reyði Krossur sendu øllum skúlaleiðslunum í Føroyum skriv og spurdu, um áhugi var fyri hesum, var svarið eitt rungandi "ja". Allir skúlarnir tóku væl ímóti hugskotinum og settu við tað sama tíð av í kalendaranum, sigur Hanus Joensen úr Undirvísingarstýrinum, sum er ráðgevi í námsfrøðiligari leiðslu.

– Nú eg hugsi um tað, er tað løgið, at vit nústani fara at læra føroysk børn fyrstuhjálp. Neyðstøður koma jú fyri, har ið fólk er, og tað er ein stórur hópur av fólki, sum hevur sína dagligu gongd í einum fólkaskúla. So tað sigur seg sjálvt, at børnini skulu duga fyrstuhjálp.

– Nógv er broytt, síðan eg gekk í 7. flokki. Tá vistu vit púrt einki um fyrstuhjálp. Um slíkt hendi tá, gjørdust vit kanska bangin og ótrygg. Summi 'frystu', og onnur sluppu sær til rýmingar at leita eftir hjálp. Tað er kanska ein natúrlig reaktión, tá ið tú ikki veitst, hvussu tú skalt bera teg at. Men tað vita tey nú – tey, sum ganga í 7. flokki.

– Hetta er eitt megnarátak, sum Betri og Reyði Krossur tóku stig til. Tað haldi eg, at eg kann loyva mær at siga vegna øll foreldur og lærarar í hesum landinum, sigur Hanus at enda.

**Reyði Krossur**

– Innanhýsis høvdu vit longu spælt okkum við tankan, um ikki fólkaskúlarnir eisini skuldu fingið undirvísing í fyrstuhjálp. Tí okkara slagorð er, at øll skulu duga fyrstuhjálp. So vit vóru beinanvegin við upp á tað, tá ið Betri heitti á okkum, sigur Tórgerð Jallgrímsdóttir hjá Reyða Krossi.

– Tað er í grundini eingin munur á undirvísingini. Vit læra næmingarnar tey fýra høvuðsstigini í fyrstuhjálp. Men okkara frálæra er kanska eitt sindur øðrvísi – eitt nú "learning by doing"*. Hetta eru 7. flokkar, so tað skal helst vera eitt sindur stuttligt. Tak til dømis tað triðja høvuðsstigið, sum snýr seg um at senda boð eftir hjálp. Her høvdu vit ein desibelmátara við, har ið næmingarnir skuldu skrála "hjálp" so hart, sum teir yvirhøvur megnaðu.

– Næmingarnir gerast sjálvandi ikki útbúnir fyrstuhjálparar, men teir læra nakrar grundleggjandi førleikar, sum til dømis, hvussu tú fert rætt til verka, og hvussu tú boðar frá. Og tað kann verða avgerandi fyri, hvussu úrslitið verður seinni, sigur Tórgerð at enda.

**Tey fýra høvuðsstigini á fyrstuhjálparskeiðnum**

1. At skapa trygd
2. At meta um tann skadda
3. At senda boð eftir hjálp
4. At geva fyrstuhjálp

* "Learning by doing" er ein frálæruháttur, ið eggjar næmingum til at læra við at gera verkligar venjingar heldur enn við at lesa, síggja og hoyra.



Heimsmálini

# Vit kunnu. Vit skulu.

Vit í Betri hava stóra ábyrgd. Hetta er einki, sum nakar annar hevur álagt okkum. Nei, ábyrgdina hava vit sjálv átikið okkum.

Tí vit kunnu ganga undan. Saman við okkara kundum, starvsfólkum og samstarvsfeløgum kunnu vit broyta Føroyar, ja, heimin, til tað betra. Og vónandi sæst tað eisini aftur í hesi CSR-frágreiðingini og tiltøkunum, sum vit stuðlaðu og fíggjaðu í fjør. Vit stuðlaðu øllum frá sjálvbodnum hjálparfelagsskapum til einstakar eldsálir – og øll hava tey uppiborið hvørt herðaklapp og hvørja krónu.

Men enn eru nógvar avbjóðingar. Avbjóðingar, ið gerast meira átrokandi fyri hvørt ár. Tað er tí av størsta týdningi, at vit standa saman.

THE GLOBAL GOALS

Vit skulu tí standa saman um hetta. Vit skulu standa saman og minnast til, at vit øll virka fyri og stremba eftir tí sama: tryggleika, vælferð og friði. Vit megnaðu væl at loysa avbjóðingarnar og gera heimin til eitt betri stað. Vit kunnu. Og vit skulu.

Vit hava orðað okkara CSR-politikk við støði í teimum 17 heimsmálunum hjá Sameindu tjóðum.

**Hetta hava vit bundið okkum til:**

- ✓ Vit vilja virka í samsvari við øll lógarkrøv
- ✓ Vit vilja tryggja fult gjøgnumskygni
- ✓ Vit vilja virka við ábyrgd og við fyriliti fyri nærøkjunum, har ið virksemið er
- ✓ Vit vilja tryggja, at vit røkka málunum í CSR-politikkinum
- ✓ Vit vilja kanna eftir, um samstarvsfelagar eisini halda síni krøv

## Hvat er ein CSR-frágreiðing?

Bulurin í CSR-frágreiðingini (*CSR* er stytting fyri *Corporate Social Responsibility*) eru umhvørvisfyrilit, sosial fyrilit og fíggjarlig fyrilit.

### Okkara CSR-politikkur fevnir um

- mannarættindi og arbeiðsmarknaðar-viðurskifti
- umhvørvi
- íløguvirksemi
- sosial viðurskifti og starvsfólkaviðurskifti

# Alt hongur *saman*

Vit í Betri hava sera stóra ábyrgd. Vit eru nevniliga Føroya størsta fíggjarsamtak, og sjálvandi skal Føroya fólk fáa gagn av tí. Tí stuðla vit á hvørjum ári tiltøkum, sum gagna samfelagnum – mentan, gransking, ítrótti – og ikki minst skaðafyribyrgjandi og tryggleikaskapandi átøkum, ið altíð hava talst millum okkara fremstu áhugamál.

"… við at stuðla okkum vísir Betri á, at eisini tey eru ein felagsskapur, sum virkar í einum uppaftur størri felagsskapi – Føroya landi. Og soleiðis eigur tað eisini at vera. Alt hongur saman. Betri letur okkum eitt oyra, ja, men afturfyri fær alt tað føroyska samfelagið eina sendirøð, sum vónandi ger tað eitt sindur stuttligari at vera barn í Føroyum. Soleiðis eigur tað at vera í einum vælferðarsamfelag, spyrt tú meg."

– Dánjal á Neystabø um barnasendirøðina
*6 spurningar um at vera menniskja*

**Reyði Krossur**
Samarittarnir

**Reyði Krossur**
Ársins fyrstuhjálpari 2021

**Rudda Føroyar**
Árligi ruddingardagurin 2021

**Ovasavnið**

**Kvinnuhúsið**
Norðurlendsk ráðstevna

**Diabetesfelagið**
Kunningarfilmur

**Berin**
Poddvarpsrøð um sorg

**Eldrafelagið Kumlá**
Útgerð

**Havnar Sjónleikarfelag**

**Funnings bygdafelag**
Standmynd av Grími Kamban

**Fjepparafelagið hjá B68**
Reiggja til rørslutarnað

**Tjóðsavnið**
Bókarútgáva um Kirkjubø

**Skálagarður**
Hitaklivi til fólk við seinheilaskaða og rørslutarni

**Alzheimerfelagið**
Kunningarfilmur

**Havnar KFUK**
Trygdarútgerð

**Javni**
Kanning um livikor

**LGBT**
Upplýsingararbeiði

**Sandavágs bygdarsavn**
Bátasmíð

**Tvøroyrar kommuna**
*Sherpa*-trappa til Hvannhaga

**Svimjisambandið**
Átak um at fyribyrgja drukning

**Heilsuhjálparafelagið**
Ráðstevna

**Krabbameinsfelagið**
Stuðul til børn í sorg
Skeið fyri lærarar

**Føroya Sjómannadagur**

**City Church**
Máltíðir til familjur

**Musikkskúlaskipanin**

**IKH Føroyar**
Ráðstevna

**Jens Pauli Heinesen**
90 ára hátíðarhald

**MEA**
Kunningartilfar

**Náttarravnarnir**
Stuðul til virksemið

**Tórshavn Boksing**
Hjartastartarar

**Ungmannafelagið Virkið**

**Team Rynkeby**
Stuðul til børn við lívshættisligum sjúkum

**Barna- og ungdómspsykiatriin**
Førleikamenning

**Fyrstuhjálparskeið til allar 7. flokkar í Føroyum**

**Blái Krossur**
Landsinnsavning

**GRANSKING:**

**Alduatlas**
LBF og Setrið

**Seinárin og sjúkueyðkenni av covid-19**
Gunnhild Helmsdal,
Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu

**Venjing og blóðstorknan**
Jacobina Kristiansen,
Landssjúkrahúsið

**Krabbameinsviðgerð**
Noomi Gregersen,
Klaksvíkar Sjúkrahús

**Diabetes**
Malan Johansen,
Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu

**Goyma $CO_2$ í undirgrundini**
Rakul Johannesen,
Jarðfeingi

Nakað av tí, Betri stuðlaði í 2022

betri

# Saman eru vit *Betri*

betri banki betri trygging betri pensjón betri heim